# 6 førarar skuldsettir fyri rúsdrekkakoyring

Hagtølini fyri rúsdrekkakoyring blómaðu upp í vikuskiftinum. Árið hevur annars verið sámiligt, har meðal mánaðarúrtøkan hjá Politinum hevur ligið um 4 bilførarar. Men hetta vikuskiftið vórðu heili seks fólk skuldsett.

DIA MIÐJORÐ

Fríggjadagur, kl. 15.44: Ferðsluóhapp á Hvítanesvegnum/Vegurin Langi.

Leygarnátt, kl. 02.17: Bilførari tikin og skuldsettur fyri rúsdrekkakoyring.

Leygarnátt, kl. 05.26: Bilførari tikin og skuldsettur fyri rúsdrekkakoyring.

Sunnunátt, kl. 02.44: Bilførari tikin og skuldsettur fyri rúsdrekkakoyring.

Sunnunátt, kl. 06.30: Bilførari tikin og skuldsettur fyri rúsdrekkakoyring.

Sunnudagin, kl. 08.40, Kollafjørður: Óhapp við Kirkjugarðin.

Sunnudagin, kl. 19.48: Maður saknaður í fjøllunum oman fyri Kaldbaksbotn.

Mánanátt, kl. 03.17: Bilførari tikin og skuldsettur fyri rúsdrekkakoyring.

Omanfyri hava vit nevnt ein lítlan part í »døgnrapportini« hjá Politinum fyri seinastu tríggjar dagarnar í vikuni, og serliga handtøka og skuldseting fyri rúsdrekka er ofta at siggja. Tað hevur annars verið eitt vikuskifti við eitt sindur av hvørjum - nakað av smærri herverkum, harðskapi, ferðsluóhappum og øðrum.

Áðrenn hetta vikuskiftið vóru tølini fyri rúsdrekkakoyring annars heilt hampilig: Januar 3, februar 5, mars 4, apríl 3, mai 4, juni 4, juli 5, august 6 og september 4. Afturat talinum fyri september skal so knýtast fongurin um vikuskiftið, so talið tilsamans gerst 10.

Suni Vinther, politikommisserur, sigur, at talið fyri handtøku og skuldseting av rúsdrekkaávirkaðum bilførarum hevur verið óvanliga høgt. Men hóast talið gerst høgt fyri september, so er talið fram til 1. september 34. Sama tíðarskeið í fjør vóru 41 og í 1994 vóru 39 skuldsett fyri rúsdrekkakoyring.

– Í september 1995 vórðu 5 tikin, so tað gevur 46. Talið í ár við teimum 10 í september gevur 44, so ein kann siga, at vit framvegis kunnu góðtaka hetta.

– Líkt er til, at talið fyri 1996 verður tað sama sum í fjør, hóast vit roknaðu við, at talið fór at minka, sigur Suni Vinther, politikommisserur.



Heili seks bilførarar vóru handtiknir í vikuskiftinum og skuldsettir fyri rúsdrekkakoyring. Talið er óvanliga høgt, verður sagt av Polit

# Nógv at gera hjá Politinum

Nakað av harðskapi, smærri herverk og nøkur ferðsluóhapp hava verið á skránni um vikuskiftið.

DIA MIÐJORÐ

**Ferðsluóhapp** – Seinnapartin fríggjadagin var eitt ferðsluóhapp á krossinum Hvítanesvegur/Vegurin Langi. Ein bilur koyrdi út frá Vegnum Langa, ið hevur treytaleysa víkiskyldu, og rendi á bil, ið var á veg til Havnar. Bilarnir fingu stóran skaða, fólkini sótu føst, men tað vísti seg seinni ikki at hava so nógv upp á seg.

**Herverk** – Í tíðarskeiðnum frá kl. 11.30 til 16.30 fríggjadagin vóru dekkini á einum bili, sum stóð parkeraður á Skálatrøð, kruvd upp. Politiið veit ikki, hvør hevur framt herverki, men vil frætta nærri, um onkur hevur sæð okkurt.

**Rúsdrekkakoyring** – Sunnunáttina varð ein 17 ára gamal drongur handtikin og skuldsettur fyri rúsdrekkakoyring. Hann verður eisini skuldsettur fyri ikki at hava koyrikort.

**Ferðsluóhapp** – Tíðliga sunnumorgunin fer ein bilur útav vegnum við kirkjuna í Kollafirði. Bilurin gerst vrak, og trý fólk vórðu flutt á skaðastovuna. Tey eru ikki illa løstað. Bilførarin verður skuldsettur fyri rúsdrekkakoyring.

**Saknaður** – Sunnukvøldið fær Politiið fráboðan, at ein maður er saknaður í fjøllunum oman fyri Kaldbaksbotn. Hann skuldi ganga frá Oyggjarvegnum og oman til Kaldbaks, men kom ongantíð vegin fram. Tað bleiv riggað til at fara í hagan at leita. Bæði politistar, hundar og fólk í Kaldbak støðu búgvin, tá tað frættist, at maðurin var heima við hús.

**Ferðsluóhapp** – Um hálvgumátta tíðina leygardagin hendi eitt ferðsluóhapp Óluvugøta/Flatavegur. Politiið hevur illgrunað um, at annar av pørtunum ikki var koyriførur, tí hesin var ávirkaður av heilivági.

**Harðskapur** – Umframt verður upplýst frá Politinum, at nøkur smærri herverk hava verið. Og eitt sindur av harðskapi hevur eisini verið á skránni. Eitt nú var ein kvinna flutt á skaðastovuna, tá hon var sligin av mannfólki. Í hesum sambandi fór Politiið heim til mannin og framdi húsarannsókn, har hópin tilfar í sambandi við Hasj-royking varð funnið.

# Boringin í Lopra á einum vegamóti

Borurin í Lopra hevur staðið stillur í níggju dagar. Hetta hevur kostað meira enn eina millión. Fyri at fáa seinasta stykki av borinum upp, er neyðugt við serligari útgerð, ið kostar um fimm milliónir aftrat. Oljufeløgini eru ójøvn á máli, um boringin skal steðga.

DIA MIÐJORÐ

– Vit meta, at brúk er fyri einum fimm milliónum, um vit skulu seta í verk ætlanina við serligu útgerðini, sigur Arne Rosenkrans Larsen frá Dopas.

Serútgerðin er komin til landið og klár at taka í brúk, men oljufeløgini skulu fyrst geva eitt svar, um tey ynskja at bora verður víðari ella at steðgast skal.

Borurin í Lopra stóð fastur seinasta leygardag og sostatt eru í dag tíggju dagar síðan, at upplýsingar komu úr undirgrundini og inni í teldurnar, sum tey nítjan oljufeløgini hava atgongd til.

– Tað hevur kostað eina góða millión at arbeiða hesa vikuna upp á boriholið, sigur Arne Rosenkrans Larsen, sum roknar við, at ein avgerð verður tikin í morgin.

Tað ber framvegis ikki til at fáa upplýst, hvussu langt niður borurin er komin. Eiheldur verða upplýsingar úr undirgrundini kunngjørdir fyri Peri og Póli.

Hóast tað er nakað síðan, at borurin hevur verið í gongd, so heldur Arne Rosenkrans Larsen, at tað framvegis er áhugavert at bora í Lopra.

– Men oljufeløgini eru eitt sindur ójøvn á máli um, tað skal haldast fram ella ikki, sigur hann.

Ein stórur partur av borinum er fingin upp, men framvegis restar eitt pettið. Og hetta pettið kostar altso 5 milliónir krónur.



Borurin í Lopra hevur staðið stillur síðan seinasta leygardag. Ógreitt er í løtuni, um boringin heldur fram. Í hvussu er skulu oljufeløgini rinda einar 5 milliónir, um boringin skal byrja aftur

VIND EN MILLION!
I DEN DANSKE STATS PRÆMIEOBLIGATIONSLÅN

For KUN 3,25 om dagen får De 10 børsnoterede præmieobligationer udstedt af Den Danske Stat (blå, rød, grøn, grå, brun og orange afd. 1-5).

Præmieobligationerne er værdipapirer og mister aldrig deres værdi, som en tipskupon eller lodseddel.

Præmieobligationerne er det eneste lotteri, hvor De kan få en STOR OPSPARING samtidig med millioner af kroner i gevinstchancer langt ind i næste århundrede.

Når De har betalt alle rater, får De obligationerne udleveret og spiller derefter GRATIS videre, indtil De sælger obligationerne til Dansk PræmieInvest eller til Deres bank.

PRÆMIEGARANTI: Dansk PræmieInvest efterser automatisk alle udtrækninger for Dem via EDB. Vi garanterer derfor, at De får udbetalt Deres gevinster kontant (-15% statsafgift), selvom De er bortrejst eller glemmer at kontrollere Deres numre i trækningslisterne.

De får direkte besked, hver gang De vinder. Straks efter, at vi har modtaget Deres bestilling, sender vi Dem et købsbevis med numrene på netop DERES præmieobligationer og DE DELTAGER STRAKS I TRÆKNINGERNE HVER 14. DAG.

4 MILL. KR. I EKSTRA CHANCER
Ved køb af flere sæt spiller De med på en EKSTRA rød præmieobligation med gevinster for 4 millioner kr. om året.
OBS! Der er også automatisk udtrækningseftersyn på denne.

GRATIS GAVE!
Bestil nu og få et lækkert chrom skrivesæt GRATIS med bestillingen

✓ Stor opsparing
✓ Præmiegaranti
✓ Tusindvis af chancer
✓ Børsnoterede værdipapirer
✓ Bedre end tips og lotto

STATSGARANTERET
20 TRÆKNINGER HVERT ÅR.

Vær med i trækningerne d. 8. okt. samt 15. okt. og 5. nov. – Og hver 14. dag fremover

65 millioner kr. og 73.602 chancer om året for gevinst
RING NU
-OG GØR DRØMMEN TIL VIRKELIGHED
42 48 67 67

Sendes ufrankeret, modtageren betaler portoen

DANSK PræmieInvest
Kirke Værløsevej 20B
+++ 0046 +++
3500 Værløse

JA TAK!
Send mig __ sæt á 10 præmieobligationer pr. efterkrav til kr. 100,- ell. kr. 200,- pr. sæt pr. md. (+ porto kr. 35,- kun første gang)
Sæt kryds
☐ Restbeløbet betales med kr. 100,- pr. md. i 47 mdr.
☐ Restbeløbet betales med kr. 200,- pr. md. i 21 mdr.
Obligationerne kan også købes kontant, ring og bestil!

Navn:
Adresse:
Postnr./By:
Tlf.:
FÆ

Vedlæg evt. check og spar porto. Udfyld venligst kuponen med blokbogstaver og send den til Dansk PræmieInvest, portoen er betalt. Gaven er ikke betinget af køb. Hvis De kun ønsker skrivesættet, bedes De indsende en check på kr. 49,- til dækning af porto og eksp.

Kontantkøbspris er kr. 2.950,- baseret på børskursen d. 30.1.96 (alle handler) incl. bankkurtage og eksp. gebyr.